# Tunnilin hevur eitt




*- Tað er við blandaðum kenslum, at vit taka ímóti nýggju tunlunum. Vit eru sjálvsagt glað fyri at fáa ein dagførdan tunnil, men betri hevði verið um vit sluppu undan at koyra gjøgnum alla Klaksvíkina, sigur Theodor Askham Olsen í Árnafirði*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

**Árnfirðingar eru fegnir um at málið um nýggju tunlarnar Norður um Fjall umsíðir varð avgreitt í tinginum. - Men tað er kortini við blandaðum kenslum at vit siga tað. Vit halda ikki, at teir hava valt ta bestu plaseringina. Tunnilin skuldi farið gjøgnum Gerðabø, sigur Theodor Askham Olsen úr Árnafirði**

**Árnafjørður:** Tað var ikki sørt ørkymlandi at fylgja við gongdini í málinum um tunlarnar Norður um Fjall:

Fyrst varð avgerð tikin um at fara gjøgnum Gerðabø, men so kom "politikkur" í málið. Og tá tað so varð endaliga avgreitt, var avgjørt at tunlarnir skuldu ganga úr Ánunum til Árnafjarðar og víðari norðureftir.

Theodor fylgdi eisini áhugaður við orðaskiftinum á tingi, og hvørji argument vórðu brúkt. Onkur helt tað var óheppið, at øll tann tunga ferðslan skuldu partú fara gjøgnum Klaksvík, men aðrar røddir hildu ikki tað saman. Onkur helt hinvegin, at ein tunnil úr Ánunum fór at fáa positiva ávirkan á handilslívið í Klaksvík. Og onkur legði nærum upp til, at um fólkið norðanfyri ikki tók við hesi loysnini, so fingu teir ongan tunnil enn á sinni!

- Mín metan er, at ein tunnil gjøgnum Gerðabø hevði ikki bara verðið betri fyri okkum, men eisini fyri klaksvíkingar í longdini.

- Og hvat gjørdi tað so, um hann kostaði eitt sindur meiri enn tann, sum vit nú fáa?, spyr Theodor Askham Olsen.

## Næstbesta loysnin

Vóru tað nøkur, sum við áhuga fylgdu við orðaskiftinum um plaseringina av nýggju tunlunum í Norðoyggjum, so mundu tað vera íbúgvararnir í Árnafirði.

Líka síðani tey fingu vegasamband við umheimin gjøgnum Borðoyatunlarnar miðskeiðis í sekstiárunum, hevur hetta málið havt teirra áhuga.

Tey hava sæð, hvussu ferðslan er vaksin í tali og í stødd hesi 40 árini. Og tey hava dugað at sæð, at her mátti ein dagføring gerast til ferðsluna í dag og í framtíðini.

Ein teirra er áðurnevndi Theodor Askham Olsen úr Árnafirði. Hann er í løtuni limur í teirri staðbundnu nevndini hjá Klaksvíkar kommunu, og hevur gjørt sær sínar hugsanir um ætlaða tunnilssambandið.

Sosialurin